
*Pætur Zachariassen er ein frálíkur frontfigurur*

# Boys on a beach

**Mest hypaði føroyski bólkurin í løtuni slapp at spæla við teimum stóru dreingjunum á Sandinum**

G!
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Boysarnir høvdu fingið litið upp í hendi at framføra á stóra pallinum niðri við sandin. Og hetta megnaðu teir til fulnar.

## Skína av spæligleði

Hóast talan ikki var um mest neyvu framførsluna, so vóru dreingirnir ein frøi at hoyra og síggja. Tað er torført ikki at smílast, tá ið tú sært spæligleðina og yvirskotið, sum skínur av Boys in a Band, meðan teir varpa út orkumiklar tónar.

Torført er at finna ein betri frontfigur enn Pætur Zachariassen. Hann dugdi væl at tosa við fólkið og var samstundis eisini sera stuttligur. Millum annað hótti hann við, at um ikki varð gjørt, sum hann segði, so fór veðrið ikki at verða gott dagin eftir.

Tað sær út til, at boysarnir hava fingið ein umfatandi fjepparaskara, tí allatíðina var lív í framman fyri pallin.


## Sløkkiliðsfólk

Søkt verður eftir "leysum" sløkkiliðsfólki til sløkkiliðið hjá Tórshavnar kommunu.

**Høvuðsuppgávur**
Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, m.a. alt vanligt sløkkiliðsarbeiði, brunafyribyrgjandi uppgávur og bjargingaruppgávur.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur handverkaraútbúgving sum t.d. bilmekanikari, maskinsmiður, timburmaður ella líknandi.
Roknað verður við, at tú innan 3 mðr. hevur førarabræv til akfar yvir 3.500 kg. og víðkað fyrstahjálparprógv.

**Annað:**
Umsøkjari má kunna verða á støðini innan 5 minuttir.
Eisini skulu umsøkjarar ið koma til samrøðu, kunna útvega reina revsiváttan frá politinum og nøktandi heilsuváttan fyri roykkavarar.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber, og lønt sambært avtalu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Kartna Jacobsen, sløkkiliðsstjóra, ella Hans Dávid Hansen, varasløkkiliðsstjóra, á tlf. 302100

**Umsókn**
Umsókn saman við viðmælum, og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera
**Tórshavnar Kommunu,**
**Postboks 32,**
**110 Tórshavn,**
í hendi í seinasta lagi 6. sept. 2007. kl. 12.00.
Merk umsóknina "Sløkkiliðsfólk"






Av tí at virksemið hjá Sansum er økt nógv, søkja vit ein dugnaligan ráðgeva.

Tú verður høvuðsráðgevi hjá nøkrum av okkara størstu kundum. Saman við kundunum og okkara dugnaligu starvsfólkum kemur tú at standa fyri nøkrum av størstu kampanjunum í Føroyum. Tað verður eisini tín ábyrgd at tryggja, at samskiftið, vit skapa fyri okkara kundar, er gott og tekur støði í mentanini og samleikanum hjá kundunum.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur hóskandi útbúgving, eitt nú eina kandidatútbúgving innan marknaðarføring ella samskifti. Tú hevur lætt við at samskifta við fólk, tú dugir væl at hugsa í heildarloysnum, hevur gott eyga fyri visuellum samskifti og natúrlig evnir fyri handli.

Sansir eru ein framfýsin samskiftisfyritøka við 33 starvsfólkum í fýra ymiskum londum. Vit skapa kunningar- og marknaðarføringsloysnir í tøttum samstarvi við okkara kundar. Førleika- og útbúgvingarstøðið hjá fólkunum á Sansum er høgt og spennir víða. Grundarlag okkara fyri støðugari menning og framburði er persónligt rásarúm, virðing fyri fjølbroyttum hugsunarhátti og stuðul til persónliga menning hjá okkara starvsfólkum.

Heldur tú, at hetta ljóðar spennandi, so eigur tú at søkja starvið. Vónandi verður tað tú, sum vilt skapa framtíðina hjá Sansum saman við okkum. Sjálvandi fært tú eina góða løn.

Umsóknir til starvið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. august klokkan 16. Umsóknir skulu sendast við telduposti til Lenu L. Mohr á lena@sansir.fo ella Høgna Rasmussen á hognir@sansir.fo. Vinarliga viðmerk títt fartelefonnummar.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Lenu L. Mohr á tel 218370 ella Høgna Rasmussen á tel 220401. Vinarliga ring millum 15.00 og 18.00. Tú kanst eisini senda fyrispurningar við telduposti til Lenu ella Høgna.

SANSIR
Pf. Sansir
Dvørgastígur 7
Postmoga 1099
FO-110 Tórshavn
www.sansir.fo